# Nýggjur sáttmáli

Maskinmeistarafelagið og Arbeiðsgevarafelagið skrivaðu í gjár undir semju um nýggjan tríggjar mánaðar sáttmála. Umframt ymsar dagføringar av sáttmálanum fevnir semjan um lønarhækking, eftirlønarhækking og hækking í vaktargjøldunum. Lønin hækkar soleiðis: 1. Juni 2007: 2,42%, 1. Juni 2008: 2,42% og 1. Juni 2009: 2,43%. Eftirlønin hækkar við 1% hvørt ár. Eisini erru onkrar smærri broytingar í lønaravtaluni.

# 62% vøkstur

Fiskafóðurfelagið Biomar í Noregi hevði í 2006 eitt úrslit eftir skatt, sum var heili 62% betri enn árið fyri. Úrslitið fyri skatt var nevniliga 196 miljónir norskar krónur móti 121 miljónum krónum í 2005. Rakstrarúrslitið í 2006 var 129 miljónir krónur móti 87 miljónum krónum í 2005. Samlaði umsetningurin av fóðursølu í 2006 var 1,621 miljardir krónur. Eginpeningurin hjá felagnum í 2006 var 184 miljardir krónur. Biomar hevur virkir í Noregi, Skotlandi, Fraklandi, Danmark, Grikkalandi og Chili.

# i hond í hond



*Áhugin fyri tiltakinum á Bakka var stórur, og fólk fingu bæði kunnleika um trygd og kundu hugna sær saman*



*Hesin báðir settu eisini við sínum ljóðførum sín dám á tiltakið*



*Bátafelagið á Bakka eigur nýggj og snotulig felagshús, sum eisini hýsa undirhúsi*



*Fólk sóu, hvussu neyðbluss skulu brúkast í neyðstøðu*




*Tveir bjargingarbátar vórðu blástir upp, meðan fólk hugdu at. Í baksýni stendur báturin Brendan*



*Eftir at hava fingið kunnleika um trygdarútgerð, varð tendrað undir grillini*

- Tey sendu bátin niður við skipi, og hann kemur eisini heimaftur við skipi. Síðan fóru tey niður at sigla, og sum eg havi skilt, eru tey sera fegin um hesa øðrvísi summarfrí í Danmark.

John Tórður Sigurðsson, sum býr í Saltangará, hevur sjálvur siglt úti sum maskinmaður í fleiri ár.

- Vit hava eina 5-mannanevnd í Bátafelagnum á Bakka, og eg havi verið formaður síðan seinasta aðalfund.

Formaður undan John Tórða var Hans Lamhauge, og undan honum var Allan Poulsen formaður.

Felagshølini á Bakka hýsa eisini undirhúsi, og her hittast limir til prát at kalla hvønn dag.